











# ítróttur

Nr. 82 • fríggjadagur • 30. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Lættari enn væntað

**Annika Ljósstein tóktist bilsin um, at føroyska landsliðið hevði vunnið somikið sannførandi á Belgia í fyrsta dystinum í Italia**

CHALLENGE-TROPHY
*jakup@sosialurin.fo*

**Mezzocorona, Italia:** Føroysku leikararnir tóktust meira lættar enn fegnar, tá tær eftir dystin kundu staðfesta, at tær fyribils eru oddalið í sínum bólki í Challenge-Trophy kappingini.

Lættar, tí tær við sigrinum høvdu lyft ein stóran part av trýstinum, sum hevur ligið á teimum, nú tær fyri fyrstu ferð eru við í hesi kappingini.

Í bussinum fingu vit orðið á Anniku Ljósstein, og hon duldi ikki fyri, at uppgávan hevði verið nakað lættari, enn roknað varð við.

- Ja, hetta bleiv nokk alvorliga nógv lættari, men vit høvdu tó eisini okkara trupulleikar. Serliga í byrjanini vóru vit sera febrilskar, men so sóu vit, at vit væl kundu vera við.



*Fyri okkara viðkomandi ræður framvegis um at fáa okkara spæl at koyra, og so mugu vit bara síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Annika Ljósstein*

Og í seinna hálvleiki tóktist tað eisini, sum høvdu tit tveitt alla virðingina fyri borð. Vistu tit tá, at tit sigurin var heima?

- Vit føldu í øllum førum, at vit høvdu yvirtakið. Tað gjørdi sítt til, at vit tordu betri at spæla, men hinvegin merkti tað kanska eisini, at vit settu dekan ov nógva ferð á, so vit framdu fleiri mistøk. Men tíbetur, so kostaðu tey okkum einki.

### Ein dyst í seinn

Undan dystinum móti Belgia hevði føroyska liðið - sum tað er nevnt aðrastaðni – møguleika at síggja seinasta korterið av dystinum millum Ísrael og Letland. Ein dystur, sum als ikki tóktist geva ábendingar um, at talan fer at gerast um nakra ræðandi mótstøðu.

Er hetta saman við sigrinum í dag nakað sum fær tykkum at droyma um finalupláss og kanska gull.

- Nei, als ikki. Nú var tað eisini bara seinasta korterið av hasum dystinum, sum vit sóu, so tað sigur kanska ikki tað stóra. Fyri okkara viðkomandi ræður framvegis um at fáa okkara spæl at koyra, og so mugu vit bara síggja, hvussu langt tað røkkur.

Men nú vunnu tit jú trygt á Belgia, sum gjørdist nummar tvey seinast?

- Ja, men eg veit ikki, um hetta er sama liðið. Nú hava tær í øllum førum fleiri ungar leikarar á liðnum, so kanska hevur talan verið um stóra útskifting. So vit fara ikki uppfrá av gleði um sigurin í dag, men hann var deiligur fyri tað, segði Annika Ljósstein at enda.¨

## Helena er ivasom

Helena Dam Poulsen var tann av føroysku málverjunum, sum varð sett sum fyrstimálverji til dystin móti Belgia, men tað gingu ikki stórt meira enn tíggju minuttir, áðrenn hon haltandi noyddist av vøllinum.

- Eg stóð føst á gólvinum, tá vit vandu týskvøldið, og tá merkti eg tað sama, men eg helt tó, at hetta nú var burtur. Hvørki í morgun ella undir upphitingini kendi eg nakað til skaðan. Men tíðliga í dystinum fekk eg so sama skaðan aftur, og so var bara at fara út segði Helena, tá vit eftir dystin fingu orðið á hana.

Tá Helena fór av vøllinum, var framvegis sera javnt millum liðini, og hon duldi heldur ikki fyri, at tað hevði verið tungt at hugt at.

- Tað var ræðuligt. Men tíbetur, so fingu vit alt betri tak á, sum dysturin gekk, og so gjørdist tað bara heilt stuttligt at hyggja, sjálvt um sjálvandi vóni at gerast klár aftur.

Sum skilst, so er talan helst um eina fipurspreinging niðarliga heilt niðri við fótin. Fysioterapeturin á landsliðnum, Malan Klakstein, er alt fyri eitt farin í holt við viðgerð við ultraljóði og øðrum, og so er bara at vóna, at Helena fer at verða tøk til komandi dystirnar.

**-jm**



*Helena Dam Poulsen fekk týskvøldið skaða í fótin, og sami skaði noyddi hana av vøllinum mikudagin*

## Oddadystur hósdagin



Beint undan dystinum hjá Føroyum móti Belgia, leiktu hini bæði liðini í bólkinum sín fyrst dyst í kappingini.

Tey bæði liðini eru Ísrael og Letland, og her eydnaðist Ísraelittunum at vinna 29-24.

Soleiðis verður talan um oddadyst í okkara bólki hósdagin, og so kann leggjast afturat, at talan eisini er um grannauppgerð. Ísraelska landsliðið býr nevnliga á sama hotellið, sum føroyska ferðalagið.

**-jm**

## Framúr byrjan

**Flemming Raben fegnaðist eftir dystin móti Belgia um viljan, sum leikararnir høvdu sýnt á degnum**

CHALLENGE-TROPHY
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Mezzecorona, Italia:** Vanliga plagar Flemming Raben at vera ein maður, sum hevur hampuliga stuttan veg til smílið, og løtan eftir sigurin á Belgia var so einki undantak í so máta.

Eftir dystin fingu vit orðið á hann, og fyrst og fremst legði hann dentin á, hvussu nógva orku leikararnir høvdu lagt í dystin.

- Geisturin í spælinum var 100%. Tað haldi eg var fremsta orsøkin til, at tað gekk so væl. Allar eru tær alla tíðina fult konsentreraðar um at halda tær avtalur, sum vit gjørdu í verjupartinum, og so má tað koma í aðru røð, at vit serliga í fyrra hálvleiki fremja nakrar tekniskar feilir, eins og kontra-spælið ikki gekk heilt eftir vild.



*- Geisturin í spælinum var 100%. Tað haldi eg var fremsta orsøkin til, at tað gekk so væl, helt Flemming Raben eftir sigurin á Belgia*

Tað eru so í øllum førum lutir, sum vit kunnu arbeiða við komandi dagarnar, helt hann, tá vit spurdu, hvussu væl nøgdur hann var við føroyska avrikið.

### Hugsaðu bert um seg sjálvar

Beint undan føroyska dystinum, høvdu tey bæði komandi mótstøðuliðini hjá okkara dystast, og her sóu føroysku leikararnir seinasta korterið ella so av einum dysti, har hvørki av liðunum tóktist hava nakra ræðandi styrki.

Var hetta kanska eisini nakað, sum sissaði føroysku leikararnar, soleiðis at tær ikki gjørdust ovurspentar undan dystinum.

- Nei, tað haldi eg slettis ikki. Spenningurin hjá okkum var fult so stórur kortini, og sum so løgdu vit heldur ikki nakran dent yvirhøvur á tann dystin, sum vit so eisini bara sóu seinasta partin av. Fyrst og fremst, so hildu vit okkum til okkara avtalur, og tann partin røktu tær til fulnar. Vit broyttu sum so heldur ikki tað stóra upp á hesar í dystinum, men tað víst seg heldur ikki at vera neyðugt, staðfesti venjarin.

Og so skiftu tit eisini rættiliga nógv út. Var hetta tilvita fyri at spara leikararnar, nú talan er um so strævna dystarskrá.

- Ja, partvíst ræður jú um hjá okkum at hava leikararnar so væl fyri, sum tað er møguligt til allar dystirnar, og tí er neyðugt, at tær eisini kunnu hvíla seg í dystunum. Og so ræður sjálvandi eisini um at fáa allar ígongd. Tað haldi eg sum so eisini, at allar komu, og sjálvt um okkurt sjálvandi kann betrast, so var hetta samanlagt ein framúr byrjan, staðfesti altso Flemming Raben at enda.